

LONG SESONG

*Hóast tað er kavi og oktober mánaður, eru enn ferðafólk í Gjáargarði. – Ein bólkur av fólki fór avstað í morgun. Umframt sjálvt gistingarhúsið, er eisini møguleiki hjá fólki at leiga seg inn í eina av íbúðunum omanfyri Gjáargarð. (innsetta myndin) – Fólk hava tikið væl ímóti tilboðum okkara. Bæði fyri 2011 og 2012 hava vit fingið bíleggingar, sigur Eirik Suni Danielsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tað eru jú bert góðir tríggir tímar úr Keypmannahavn og norður til Gjáar

tørvin, bæði hjá føroyingum og útlendingum.

– Tað tekur fleiri ár at byggja eitt slíkt virksemi upp. Og eg haldi nú, at áhugin fyri okkara tilboði er bara vaksandi, vísir hann á.

Hetta kann Eirik Suni eisini staðfesta svart uppá hvítt: Komandi ár er longu væl bookað, og nógv hava eisini biðið um pláss í 2012.

– Tað vísir seg tíbetur ikki at vera nakar trupulleiki at fylla húsið um summarið.

## Loys málið

Summarið er sjálvandi tíðin, tá flestu ferðafólkini leggja leiðina norður til Gjáar.

Gistingarhúsið stendur tó ikki tómt vetrarhálvuna, tá ein ístaðin hevur úr at gera við at skipa fyri skeiðum, fundum og seinni fyri jólaborðhaldum.

Tað eru sjálvandi føroyingar sum í størstan mun velja at hava skeið ella fundir sínar á hesum staði. Og tað vísir seg eisini, at fólk fáa nakað burtur úr at vera her norðuri.

Eitt av slagorðum teirra er júst hetta: "Loys málið á Gjáargarði", og tað er ikki uttan orsøk, at tey tora at lýsa við hesum.

– Ja, eg hoyri ofta fólk siga, at eitt mál sum tekur langa tíð at avgreiða á skrivstovuni ella fyritøkuni, verður avgreitt nógv skjótari her norðuri.

– Her fáa fólk eitt gylt høvi at savna hugin um tað ítøkiliga málið, og fáa tí munandi meiri av skafti, staðfestir Eirik Suni.

Tað eru tó eisini ávísir bólkar úr útheimi sum ynskja at leggja fundir ella skeið síni við Gjógv. Hetta talið tykist vera vaksandi, helst tí at mangar fyritøkur hava roynt so mong ymisk stød í Danmark í hesum sambandi, at nú er næstan einki eftir.

– Og tað er sjálvandi einki at siga til, at tey velja henda møguleikan. Eg meini so við, – tað eru jú bert góðir tríggir tímar úr Keypmannahavn og norður til Gjáar, staðfestir Eirik Suni Danielsen.

*snorri@sosialurin.fo*

## Nógvir vegir til Gjáar

**Fyri fólkið við Gjógv er tað av alstórum týdningi at kunna sleppa av bygdini og aftur til bygdina eftir loknan arbeiðsdag.**

**Til bygdina er vanliga koyrandi tveir vegir - annaðhvørt gjøgnum Funningsfjørð ella eftir Eiðisvegnum.**

**– Ja, vit eru í teirri hepnu støðuni, at ikki minni enn tveir vegir føra norður til okkara. Eg plagi at anbefala fólki at koyra higar gjøgnum Funningsfjørð um veturin, tí hann er betri hesa ársins tíð.**

**– Eg havi hoyrt onkran siga, at tey ikki tora aftur til Gjáar, tí vegurin skal vera so vandamikil.**

**– Men eg haldi kortini ikki, at nakar skal vera bangin fyri at koyra um Gjáarskarð. Teir hjá Landsverki eru óførir at rudda vegin fyri kava um veturin, so tað er eingin forðing, slær Eirik Suni fast.**